Toftir frá víkingatí›ini úti í Grøv

Peningur hevur ikki veri› tøkur til fornfrø›iligan útgrevstur á økinum, sigur Jógvan Lützen í vi›merkingum til fyrispurning

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Jógvan Lützen, løgtingsma›ur, hevur sett mentamálará›harranum fyrispurning, og vil hava at vita, um landsst‡risma›urin fer at seta pening av til útgrevstur av forminnunum Úti í Grøv? Um ikki, hvørjar ætlanir hevur landsst‡risma›urin, sum kunnu tryggja, at øki› vi› fornminnunum ikki ferst, sum frálí›ur?

Skógfri›a›

Í vi›merkingunum, sigur Jógvan Lützen at fyri uml. 20 árum sí›ani var› øki› Úti í Grøv í Klaksvík, skógfri›a›, m.a. tí at ta› eru fornminnir í økinum. Naka› á›renn hetta vóru einstaklingar farnir at gró›urseta trø og runnar í økinum.

Og uppl‡st ver›ur, at kønir menn meta, at fornminnini eru toftir frá víkingatí›ini, og at peningur hevur ikki veri› tøkur til fornfrø›iligan útgrevstur á økinum.

Út á sjógv

– Tá serliga nógv vatn er í ánni, sum rennur oman í gjøgnum øki›, hendir ta› ofta, at áin floymir yvir toftirnar. Vandi er fyri, at hetta, sum frálí›ur, kemur at ska›a vir›i› á fornminnunum, sigur Jógvan Lützen.

– Í ódnarve›rinum og regninum, sum var 18. september í ár, var áarføri› so nógv, at áin ikki svølgdi. Hetta hev›i vi› sær, at vatn floymdi yvir toftirnar, og stórur vandi var fyri, at toftirnar kundu fingi› stóran ska›a. Í ringasta føri kundu tær skola› út á sjógv, metir Jógvan Lützen í vi›merkingunum til fyrispurningin.

Lærarafelagi› kallar inn til eykaa›alfund

Teir 700 limirnir í Føroya Lærarafelag hava fingi› fundarbo› frá nevndini. Kalla› er inn til eykaa›alfund, men forma›urin í nevndini, Elsa Birgitta Petersen, vil ikki siga nágreiniliga, hvat ver›ur á skránni, ella hví nevndin hevur kalla› inn til eykaa›alfund. Hon váttar tó, at samlagstryggingin ver›ur á skránni

EYKAA‹ALFUNDUR
Stefan í Skorini

Ein bólkur av lærarum hevur seinastu mána›irnar arbeitt vi› at kanna samlagstryggingina, sum Føroya Lærarafelag hevur tekna› vi› LÍV.

Teir fílast á ískoytiseftirlønina, i› er ein partur av samlagstryggingini, sum teir meta er óræ ttvís, tí teir eldru lærararnir fáa nógv meira burturúr peningaliga enn teir yngru.

Teir yngru lærararnir føla seg fyri vanb‡ti í n‡ggju tryggingini, og teir mæla til, at ískoytiseftirlønin ver›ur beind burtur. Ískoytiseftirlønin er eitt gjald á 100.000 krónur, sum lærarar fáa, tá teir koma til eftirlønaraldur.

Elsa Birgitta Petersen váttar, at samlagstryggingin ver›ur eitt mál á skránni á eykaa›alfundinum, men hon vil ikki gera nakra vi›merking til, hvørja stø›u nevndin hevur vi›víkjandi samlagstryggingini. Bí›a› ver›ur eftir, hvat a›alfundurin hevur at siga

Yngru lærararnir hava arbeitt vi› at savna undirskriftir inn, so at nevndin skal kalla inn til eykaa›alfund fyri at vi›gera samlagstryggingina. Enn eru teir ikki komnir á mál vi› undirskriftunum, men hóast ta› hevur lærarafelagi› kalla› inn til eykaa›alfund av sínum eintingum.

A›alfundurin ver›ur 2. desembur í Læraraskúlanum, men forma›urin í nevndini, Elsa Birgitta Petersen, vil ikki almannakunngera enn, hvat fundurin fer at snúgva seg um. Elsa Birgitta sigur tó, at samlagstryggingin ver›ur á skránni.

– Vit arbei›a vi› at gera eina endaliga skrá til eykaa›alfundin, og tá hon er búgvin, sleppa álitisfólkini at síggja hana. Álitisfólkini eru okkara samband út á økini, og tey skulu síggja skránna fyrst, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hevur nevndin í Lærarafelagnum lagt nakra ætlan, hvat tit ætla vi› samlagstryggingini?

– Ta› er ein a›alfundarsamtykt vi› samlagstryggingini, og nú mugu vit síggja, hvat ein annar a›alfundur sigur vi›víkjandi henni, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hví hava tit mett, at ta› er ney›ugt at kalla inn til eykaa›alfundar?

– Eg fari ikki at siga fjølmi›lunum ta› fyrst, tí ta› er naka›, sum er millum okkara limir og álitisfólkini. Ta› er best, at álitisfólkini ver›a kunna› fyrst, sigur forma›urin.

– Nú skulu vit bo›a øllum limunum frá, at ta› er eykaa›alfundur, og vit hava bi›i› um at fáa mál til skránna send inn, og tí bí›a vit eftir, sigur Elsa Birgitta.

Ta› liggur tó nær at hugsa sær, at høvu›smáli› á a›alfundinum ver›ur samlagstryggingin, sum stór ónøgd hevur veri› vi›, serliga millum teir yngru lærararnar.

Avtalan vi› samlagstryggingini vi› LÍV er framvegis galdandi, men ta› liggur í kortunum, at hon ver›ur broytt, ella at okkurt hendir vi›víkjandi tryggingini.

Lærarar hava eisini sett nevndini nakrar fyrispurningar vi›víkjandi samlagstryggingini, sum teir enn ikki hava fingi› svar uppá.

Sosialpolitiskt heilt burturvi›

Ta› er ófatiligt, at fíggjarmálará›harrin, i› hevur ábyrgd av, at ásetingarnar í lógini um landsskatt og kommunuskatt ver›a umsitnar lógliga, hevur gó›kent, at allir fyrití›arpensjónistar ikki eru líka fyri lógini, sigur Kristian Magnussen m.a. í vi›merkingum til fyrispurning

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Kristian Magnussen, løgtingsma›ur, hevur sett Helenu Dam á Neystabø 7 spurningar, og vil hann m.a. hava at vita, hvussu nógv hava greinarnar 8 til 13 í kunnger› um persónliga vi›bót sambært lóg um almannapensjónir kosta› higartil í ár, og hvussu nógv ver›a hesar mettar at kosta fyri alt ári›? Hvussu stórur er samla›i kostna›urin higartil í ár av teimum persónligu vi›bótunum, i› sambært landsst‡rismanninum ikki eru heimila›ar í lóg, og hvussu nógv metir landsst‡risma›urin, at kostna›urin ver›ur fyri alt ári›?

Kristian Magnussen spyr eisini, hvussu nógv kunnger›in um hjálparrá› hevur kosta› higartil í ár, og hvussu nógv metir landsst‡risma›urin, at kostna›urin ver›ur fyri alt ári›? Og ger Almannastovan tørvsmetingar, tá søkt ver›ur um stu›ul til hjálparrá›? Er svari› noktandi ynskist svar uppá, hví hetta ikki ver›ur gjørt? Kann landsst‡risma›urin geva dømir um, hvussu hesin frádráttur ver›ur umsitin, t.v.s nær ein fyrití›arpensjónistur fær fullan frádrátt, og nær frádrátturin fellur burtur orsaka› av inntøku? spyr Kristian Magnussen m.a. í fyrispurninginum.

Ólógliga

Í rættiliga drúgvu vi›merkingunum, sigur Kristian Magnussen, at sjálvur er hann ikki í iva um, at landsst‡risma›urin vi› greinunum 8 til 13 í kunnger›ini hevur álagt Almannastovuni at umsita greinina um persónliga vi›bót í lógini um almannapensjónir ólógliga, vi› ta› at bara pensjónistar, i› hava serliga trupul kor í mun til a›rar pensjónistar, eiga at ver›a fevndir av hesi grein.

– Somulei›is er ta› ein treyt, at ein tørvsmeting eigur at ver›a gjørd í hvørjum einstøkum føri, á›renn stø›a skal takast til, um persónlig vi›bót skal veitast. Ta› hevur altí› veri›, og eigur eisini enn at vera ein heilt natturlig treyt, at móttakari av persónligari vi›bót ikki er førur fyri at bera útrei›sluna sjálvur.

Inntøkufrádráttur

Ví›ari sigur Kristian Magnussen vi›víkjandi inntøkufrádráttinum, at hesin inntøkufrádráttur ver›ur umsitin solei›is vi› vælsignilsi frá landsst‡rismanninum í fíggjarmálum, at Almannastovan útgjaldir ein stóran part av pensjónsvi›bótini, i› er skattskyldug, skattafrítt. Teir fyrití›arpensjónistar, i› hava so miki› av a›rari inntøku umframt pensjónina, at pensjónsvi›bótin fellur burtur, fáa ikki henda frádrátt.

– Ta› er ófatiligt, at landsst‡risma›urin í fíggjarmálum, i› hevur ábyrgd av, at ásetingarnar í lógini um landsskatt og kommunuskatt ver›a umsitnar lógliga, hevur gó›kent, at allir fyrití›arpensjónistar ikki eru líka fyri lógini.

– Harumframt er ta› sosialpolitiskt heilt burturvi›, at teir fyrití›arpensjónistar, i› hava førleika og umstø›ur at forvinna naka› umframt pensjónina, á henda hátt kanska hava minni eftir aftaná skatt, enn ein fyrití›arpensjónistur, i› ikki forvinnur meira enn, at hann hevur rætt til fulla pensjónsvi›bót og fullan frádrátt.

– Hesin inntøkufrádráttur, i› sum sagt ver›ur umsitin vi›, at pensjónsvi›bótin, i› er skattskyldug, ver›ur útgoldin partvís uttan um skattalógina, fór at virka vi› pensjónsútgjaldingunum mána›arskifti› apríl/mai. Pensjónistar hava ikki fingi› ágó›an av hesum frádrátti fyri fyrstu 4 mána›irnar í ár, og tí hevur ta› áhuga at fáa at vita, nær hetta eftirgjaldi› ver›ur veitt teimum, i› hava rætt til ta›, og hvussu og av hvørjum ta› fer at ver›a útgoldi›, sigur Kristian Magnussen m.a. í vi›merkingunum.

Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Amariel Nor›oy, Kári Svensson, Astri Luihn og Ey›un av Reyni eru útvald at s‡na fram í New York í døgunum 5. til 23. desember

(Mynd: Jens Kristian Vang)

Føroysk myndlist til New York

Tann 1. desember fara 5 føroysk myndlistafólk til New York, har ein frams‡ning ver›ur vi› teirra verkum

LIST
Dagfinn Olsen

Í døgunum 5. til 23. desember hendir naka› í New York, i› ikki hendir har á hvørjum degi.

Tá ver›ur nevniliga ein føroysk listaframs‡ning at síggja í amerikanska stórb‡num.

Søgan byrjar vi›, at hjúnini Tordur og Sigrun G. Niclasen vitja›u í New York. Har komu tey í samband vi› kvinnu, i› fæst vi› listaframs‡ningar vegna felagsskapin American/Scandinavian Society. Sigrun hevur hildi› sambandi› vi›líka og sent tilfar yvir til hennara av umlei› 14 føroyskum listafólkum.

Solei›is er íkomi›, at 5 føroysk listafólk tann 1. desember leggja lei›ina til New York. Tey, i› eru sloppin ígjøgnum nálareyga›, eru Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Amariel Nor›oy, Kári Svensson, Astri Luihn og Ey›un av Reyni.

Skal ikki takast bókstaviliga

– Vit ætla ikki at leggja okkum út í, hvat fólk gera í frítí›ini, sigur Fiskirannsóknarstovan

ARBEI‹SMARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

Ætlar Fiskirannsóknarstovan at blanda seg uppí, hvat fólk gera í frítí›ini?

Hendan spurningin hava lesarar sett sær aftaná at tey hava lisi› eina l‡sing frá Fiskirannsóknarstovuni í blø›unum í farnu viku.

Tá l‡sti Fiskirannsóknarstovan eftir fólki at taka royndir av fiski, sum var› avreiddur í Su›uroynni.

Gjørt var› vart vi›, at talan var bara um eitt parttí›arstarv, men umsøkjarar skuldu helst ikki hava anna› arbei›i.

Á fiskirannsóknarstovuni sigur Søren Sørensen, at sjálvandi fer Fiskirannsóknarstovan ikki at leggja seg út í, hvat fólk gera í frítí›ini.

– Talan er neyvan um meiri enn eitt _ starv. Men trupulleikin er, at tann, sum ver›ur settur, skal vera tøkur, tá i› bátar avrei›a og ta› kann vera nær sum helst.

Hann heldur, at l‡singin kundi kanska veri› or›a› ø›rvísi, tí um umsøkjari hevur arbei›i, sum hann altí› kann fara frá, fer Fiskirannsóknarstovan sjálvsagt ikki at leggja seg út í ta›.

Grundarlagi› undir stovnsrøkt

Søren Sørensen sigur annars, at hetta arbei›i›, at taka royndir av avrei›ingum, er ein partur av grundarlagnum undir stovnsmetingunum hjá Fiskirannsóknarstovan.

Talan er um at taka stakroyndir av avrei›ingum. Longdin á fiskinum skal mátast og fiskurin skal vigast. Somulei›is skulu nitrur takast fyri at sta›festa aldurin. Á Kongafiski ver›ur tó bara kanna› eftir, hvussu stórur hann er, og, hvat kyn hann er.

Fiskirannsóknarstovan hevur fólk kring landi› at taka royndir av tí, sum bátar og skip avrei›a. Hetta er ein partur av grundarlagnum undir stovnsmetingunum

Gekkur vann fólki neisur

Gekkur bar seg undarliga at fríggjakvøldi›. Men ta› fekk ongin naka› burturúr, sigur grannsko›arin, sum hevur evstu ábyrgdina av, at alt fer rætt fram

– Gekkurin hjá sjónvarpinum vann fólk neisur fríggjakvøldi›. Men ta› var ongin, sum fekk nakran fyrimun av tí

HAPPADRÁTTUR
Áki Bertholdsen

Tey, sum spældi gekk fríggjakvøldi› varna›ust naka› løgi›: Í tri›ja og fjór›a spæli vór›u akkurat tey somu tølini drigin, tal fyri tal.

Men Ole Guldborg Nielsen, sum arbei›ir hjá grannsko›aravirkinum, Rasmussen og Weihe, vissar um, at ongin hevur fingi› nakran fyrimun av tí.

– Fríggjakvøldi› fann so teldan uppá at draga tey somu tølini tvær fer›ir upp í slag. Men ta› var av berari tilvild. Sannlíki fyri at slíkt hendir, er ómetaliga líti›. Men fríggjakvøldi› hendi ta› so kortini.

Hann leggur tó dent á, at ta› er ikki nóg miki› til at nakar spælari fær fyrimun. Tí fyri at vinna, skulu tølini, sum ver›a drigin, passa vi› tølini á plátuni. Og ongin hev›i tvær plátur vi› somu tølum á.

Ta›, sum hendi fríggjakvøldi›, hev›i ikki veri› ein fyrimunur, uttan so, at onkur hev›i akkurát somu tølini á plátunum, sum vóru brúkt til tri›ja og fjór›a spæli.

Gera sær stóran ómak

Ole Guldborg Nielsen visur á, at tey hava gjørt sær ómetaligan ómak fyri, at ongin skal hava naka› at seta fingurin á í samband vi› Gekkin.

Og hann sigur, at tey á›renn Gekkur byrja›u, funnu tey eina skipan, sum er 100% trygg.

Hann sigur, at ta› eru tvær óheftar telduskipanir, sum draga tølini og sum prenta pláturnar.

– Tølini ver›a drigin á eini teldu í Danmark, sum púra onki hevur vi› sjónvarpi› at gera. Tey ver›a send til grannsko›aravirki› Rasmussen og Weihe á diski í innsigla›um brævbjálva. Har ver›a tølini liggjandi í pengaskápi inntil eina tíma fyri hvønn drátt, tá i› eg sjálvur beri tey oman í sjónvarpi og eri hjástaddur til sjónvarpi› hevur kanna› eftir, at diskurin er ílagi.

Tá er sølan av gekkheftum hildin uppat.

Ole Guldborg Nielsen sigur, at trygdarskipanin er so strong, at hvørki hann, ella konan, ella børnini, hava loyvi til at spæla Gekk.

Hinvegin ver›a pláturnar prenta›ar á eini heilt a›rari teldu og tey eru eisini tilvildarlig. Júst ta›, at ein ikki sleppur at velja tølnii á plátunum sjálvir, tryggjar, at ta› er tilvildin, sum ræ›ur, sigur Ole Guldborg Nielsen.